## Triathlon kapping fyri lið

Føroya Triathlonfelag fer nú undir at skipa fyri liðkapping á sprint-teininum í triathlon. Tann kappingin verður 23. oktober, og er hon opin fyri bæði feløg, stovnar og onnur, sum hava áhuga at seta eitt lið saman.

Oktober mánaður verður annars ein mánaður, har nógv fer at ganga fyri seg innan triathlon-ítróttina. Í alt ferða ikki færri enn fýra kappingar hildnar. 2. oktober verður FM í 1/8 triathlon (sprint). 9. oktober verður kapping í Duathlon, har svimjingin ikki er partur av kappingini.

23. oktober verður so liðkappingin í sprint, meðan FM-kappingin OL-teininum verður tann 30. oktober.

**-mørk**

## Real Madrid fekk bank

**Lyon vann heili 3-0 á Real Madrid, sum soleiðis hevur fingið eina stak ringa byrjan upp á kappingarárið**

Um vikuskiftið tapti Real Madrid á heimavølli í sponsku La Liga, og týskvøldið gjørdist talan so um sannan avsmurning, tá stjørnusetta liðið vitjaði í Lyon í fyrsta dystinum í bólkaspælinum í Champions League kappingini.

Aðra staðni í Europa vísti Rosenborg, at hóast trupulleikar í heimligu kappingini, so kann liðið enn gera um seg í Europa, og verjandi meistararnir úr Liverpool fingu eisini eina góða byrjan. Teir vunnu trupla útidystin móti Betis við 2-1.

Úrslitini týskvøldið vóru annars hesi;

| | |
|---|---|
| Milan-Fenerbache | 3-1 |
| Chelsea-Anderlecht | 1-0 |
| Artmedia Bratislava-Inter | 0-1 |
| Lyon-Real Madrid | 3-0 |
| Olympiakos-Rosenborg | 1-3 |
| PSV Eindhoven-Schalke 04 | 1-0 |
| Rangers-Porto | 3-2 |

# Andrew hevur mist makkaran

**Toppskjúttin í Fremad Amager er í vikuni farin úr felagnum, og ein annar spælari, sum sigst at vera rættuliga málsøkin, er komin í felagið**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Tað hevur sum heild gingið væl hjá Andrew av Fløtum og Fremad Amager tað, sum er farið av hesum kappingarárinum. Tað hava onnur feløg eisini lagt til merkis, og tað vil siga, at feløg, sum kanska eiga fleiri pengar enn Fremad Amager, eru áhugað í at knýta spælarar hjá Fremad Amager at sær.

Fyrst í vikuni var greitt, at toppskjúttin og álopsfelagin hjá Andrew av Fløtum, Henrik Toft, sum hevur verið hálvt annað ár í Fremad Amager, nú beinanvegin fer til Vejle, sum Fremad Amager síðsta vikuskifti vann móti á heimavølli. Vejle hevur stóran ætlanir um at endurvinna plássið í bestu deildini, men fyrstu umførini í hesum kappingarárinum hevur tað ikki hilnast nakað serligt hjá teimum í næstbestu deildini.

Álopsspælarin hevði skrivað undir sáttmála við Vejle frá nýggjárinum av, men nú hevur Vejle lagt so mikið av pengum á borðið, at teir í Fremad Amager hildu tað ikki vera ráðiligt at seta seg ímóti, at hann nú beinanvegin flutti til Jyllands. 24 ára gamli og 196 cm høgi Henrik Toft hevur spælt 50 dystir og skorað 19 mál fyri Fremad Amager. Í teimum fyrstu sjey umførunum í hesum kappingarárinum hevur hann skorað sjey mál.

Maður kemur í mans stað, plagar at verða tikið til, og soleiðis er tað eisini í hesum førinum. Andrew hevur havt tveir kappingarneytar til álopsplássini, og tað fer hann eisini at hava í framtíðini. Fremad Amager hevur skrivað undir sáttmála við Martin Skov, sum tvey tey seinastu árini hevur spælt við Amager United, sum er seriulið. Har hevur hann í 70 dystum skorað 82 mál!

Nýggi álopsspælarin er ikki ókendur í Fremad Amager. Har spældi hann í 2003, og tá varð hann skrásettur fyri at hava skorað trý mál.

Fremad Amager skal í 8. umfarinum í næstbestu deildini spæla á útivølli móti Brønshøj. Dysturin verður seinnapartin leygardagin á Tingbjerg stadion í Keypmannahavn.

# Vlada burtur í eitt hálvt ár

**Arnhold Berg hevur ilt við at koma seg heilt eftir knæskaðan, og tað er óvist, um Bjarni Jørgensen verður førur fyri at spæla móti HB**

SKÁLA
*Jóannes Hansen*

Á Skála og á Strondum er fótbóltsfepurin framvegis eins høgur, og hann hevur verið tvey tey seinastu árini. Kanska er hann eitt vet hægri, enn hann nakrantíð hevur verið. Í hvussu so er, so er tað framvegis soleiðis, at Skála er á odda, og at teir harvið liggja best fyri í FM kappingini.

Sunnudagin verður toppdystur á Skála, tá ið HB fer at vitja, og tað er longu greitt, at manningarligu fyritreytirnar hjá Skála ikki eru so góðar, sum tær hava verið.

Sambært heimasíðuni hjá Skála Ítróttarfelag, so varð málverjin, Vlada Filipovic, lagdur undir skurð á Landssjúkrahúsinum á middegi mánadagin. Hælsinan varð seymað saman aftur, og boðini, sum málverjin fekk, vóru, at hann skal halda seg heilt burtur frá fótbólti næsta hálva árið, og tríggjar tær fyrstu vikurnar skal hann halda seg heilt í frið á Strondum, har hann býr.

Tað vil við øðrum orðum siga, at Skála málverjin ikki fer at spæla aftur í ár, og um hann heldur seg til tað, sum læknarnir hava givið honum boð um, so verður hann heldur ikki millum áskoðararnar, tá ið HB sunnudagin fer at spæla á Skála.

Sunnudagin loysti Eugen Voda av í Skála málinum, og tað verður eftir øllum at døma hann, sum fer at verja málið sunnudagin.

Har ein skriðan er lopin, er onnur væntandi, plagar at verða tikið til. Sunnudagin noyddist evnaríki Skála miðvallarin, Bjarni Jørgensen, at gevast í Klaksvík. Í kapprenning við mótstøðumann steðgaði hann knappliga á og bað um at sleppa av vøllinum. Talan er um vøddaskaða. Bjarni hevur ikki vant síðani, og á Skála hava teir ikki góðar vónir um, at hann fer at verða tøkur sunnudagin móti sínum barndómsfelag.

Tað hevur heldur ikki gingið nakað serligt hjá Arnholdi Berg síðstu tíðina. Krútsterki verjuspælarin var burturi frá alla fyrru hálvu orsaka av krossbandsskaða. Undan summarsteðginum spældi hann onkra løtu, og eftir stutta summarsteðgin tóktist tað sum um, at hann hevði vunnið fast pláss á høgra vongverja. Men tær seinastu ferðirnar hevur Arnhold spælt lítið. Orsøkin er tann, at tað er torført hjá honum at koma seg heilt eftir knæskaðan.

Oman á allar skaðarnar, sum plága oddaliðið, telur tað á positivu síðuni, at veteranurin Alexandur Johansen, sum mest sum einki hevur spælt í ár orsaka av fótskaða, nú er við aftur. Hann var eina løtu á vøllinum í Klaksvík, og tað kann væl fara at vísa seg, at hann kann gerast rættuliga týdningarmikil í endaspurtinum.

KÍ-VB:

# Tað stendur heilt nógv upp á spæl



*Higartil í ár hevur VB staðið seg væl í uppgerðunum móti KÍ. Og stigini eru ikki minni týdningarmikil hesaferð, enn tey hava verið*

**Í Klaksvík siga teir seg hava gott mót, og tað hava vágbingar eisini, hóast ein av mest sentralu monnunum ikki verður við í kvøld**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Tað stendur heilt nógv upp á spæl, tá ið KÍ og VB í kvøld fara at spæla landskappingardyst í Klaksvík. Bæði feløgini eru framvegis í vanda fyri at flyta vinnur. Um ein vinnari verður funnin í kvøld, so fer hesin at taka stórt fet burtur frá keðiligu hóttanini.

- Fyri fyrstu ferð síðani í mai mánað hava vit spælt tveir landskappingardystir á rað uttan at tapa. Vit hava vunnið í Gøtu og spælt javnt á heimavølli móti Skála. Tað halda vit boðar frá góðum hugburði, og sjálvandi fara vit á vøllin hóskvøldið fyri at fáa øll stigini, verður sagt úr Klaksvík.

Alt fólkið er tókt hjá KÍ. Eisini miðvallarin Høgni Madsen, sum var leikbannaður móti Skála. Tað ber við sær, at tað er ikki frítt, at tað er kapping um plássini á KÍ liðnum. Unglingaspælarin Kristoffur Jacobsen, sum fríggjakvøldið skal spæla hálvfinalu í unglingadeildini í Runavík, stóð seg væl, tá ið hann varð skiftur inn móti Skála, og hann er eisini boð upp á pláss millum teir fyrstu ellivu.

Vágbingar fara frá húsum í morgun, og teir koma ikki til hús aftur fyrrenn mánakvøldið. Eftir túrin í Klaksvík fara teir í morgin til Íslands, har teir skulu vitja vinarbýin hjá Vági, Sandgerði, og spæla móti Reynir, sum í dag fyllir 70 ár.

Men fyrst snýr tað seg um ferðina til Klaksvíkar og uppgerðina móti KÍ og takið at sleppa burtur úr botninum.

- Mortan úr Hørg venur í Havnini. Annars hava allir spælararnir verið til venjingar her suðuri í hesi vikuni, og lagið er gott, hóast vit sjálvandi iðraðu okkum um, at tað ikki eydnaðist at halda tørn og harvið at vinna í Fuglafirði, verður sagt úr Vági.

Hjá VB er tað sjálvandi stórur smeitur, at Milan Kuljic, sum man vera ein tann stinnasti miðvallarin í føroyskum fótbólti, verður leikbannaður í kvøld.

VB hevur annars staðið seg væl móti KÍ í ár. Í 2. umfari 3. apríl endaði tað 1-1 í Klaksvík. Tá var VB á veg móti sigrinum, men í evstu løtu gjørdu teir óneyðugt brotsspark, sum KÍ umsetti til mál. 26. juni vann VB í 14. umfarinum stórsigur á KÍ á Vágseiði. Úrslitið var 6-1.

Dysturin í Klaksvík í kvøld verður klokkan 19.15, og sambært dómarayvirlitinum verður tað Dagfinn Olsen, formaðurin í Dómarafelagnum, sum verður 23. maðurin á vøllinum.0